# Føroyar tænastudepil í Norður Atlantshavi

## At menna Føroyar sum tænastu-miðdepil er ein av verkætlanunum, sum SamVit stendur fyri


Durita í Grótinum

SamVit stendur fyri verkætlan, ið hevur til endamáls at menna Føroyar sum tænastudepil, so skip, ið sigla kring Føroyar, ikki sigla langa leið - og framvið Føroyum, eftir vørum og tænastum, ið eins væl kunnu veitast í Føroyum.

Hetta er ein av fleiri ætlanum, sum Durita í Grótinum hevur ábyrgd av. Hon sigur, at SamVit fær stuðul frá Vinnuframagrunninum til fleiri ætlanir, og at hetta er ein av teimum.

Durita í Grótinum byrjaði í oktober á SamVit. Hon sigur, at tá tosað verður um tænastudepil, so verður hugsað um bæði fiski- og frálandavinnu. Hon leggur dent á, at tað er av stórum týdningi at hava í huga, at hetta eisini skal umfata 3. lands vørur og umskiping, og her mugu vit hava amboð, ið standa mát við ES krøv, og her eru vit ikki komin á mál enn.

### Depil í Norður Atlantshavi

North Atlantic Resource Centre - menning av tænastudeplum í Norður Atlantshavi. Hetta er heitið á verkætlanini. Í ætlanarlýsingini verður m.a. sagt, at kring Føroyar sigla hópin av skipum. Nógv av hesum skipum sigla langa leið, framvið Føroyum, eftir vørum og tænastum, ið annars kunnu veitast úr Føroyum. Plaseringin av Føroyum mitt í norður Altantshavi gevur føroyskum fyritøkum møguleikan at veita tænastur og vørur til hesi skip. Nakrar føroyskar fyritøkur (agency fyritøkurnar) veita tænastur og vørur til nøkur skip, men tað eru nógv fleiri skip, ið ikki koma inn her. Vit eiga tí at gera eina marknaðarkanning fyri økið kring Føroyar, sum hevur til endamáls at fáa greiðu á hvørji skip sigla framvið Føroyum og hvørjar tænastur og vørur føroyskar fyritøkur kunnu veita hesum skipum. Marknaðarkanningin er eitt framhald uppá arbeiðið, ið hevur verið gjørt fyri at menna Føroyar sum "North Atlantic Resource Centre". Í arbeiðinum hevur fokus higartil mest verið á russisk skip, men í eini marknaðarkanning eiga vit eisini at staðfesta tørvin hjá øðrum skipabólkum, sum t. d. sponskum, portugisiskum, fronskum og grønlendskum skipum.

Endamálið er at gera eina marknaðarkanning fyri økið kring Føroyar, fyri at fáa greiðu á hvørji skip sigla framvið Føroyum, og fyri at finna fram til, hvørjar tænastur og vørur føroyskar fyritøkur kunnu veita hesum skipum, verður sagt í verkætlanarlýsingini.

Um visjónina í verkætlanini verður sagt, at visjónin er at menna Føroyar sum North Atlantic Resource Centre og at marknaðarføra Føroyar sum umskipingardepil fyri skip úr fleiri londum.

Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo


Hurtigruten tvífaldaði hallið frá 2006 til 2007 (Mynd: Hurtigruten)

## Hurtigruten í andróðri

Norska Hurtigruten hevði tvær ferðir so stórt hall í oktobur ársfjórðingi í fjør sum í sama ársfjórðingi í 2006. Tríggjar teir seinastu mánaðirnar í fjør var hallið 331 mió. norskar krónur fyri skatt ímóti 166 mió. krónur somu mánaðir í 2006. Enn er 2007 ikki endaliga uppgjørt, men felagið væntar, at úrslitið verður 224 mió. krónur í halli ímóti við 62 mió. árið fyri. Tølini eru tó ikki heilt sambærilig, tí umstøðurnar vóru ikki tær somu bæði árini.

## 2007 gott ár hjá ØK

Árið í fjør royndist væl hjá danska skipafelagnum ØK. Roknskapurin vísir, at av einum umsetningi upp á 4,4 mia. krónur gjørdist avlopið 473 mió. krónur. Tað merkir, at umsetningurin vaks 23 prosent í 2007, og at rakstraravlopið varð næstan tvífaldað. Í viðmerkingunum sæst, at bæði vøksturin í umsetninginum og avlopinum stavar frá virksemi felagsins í Venesuela. Í ár væntar ØK, at umsetningurin verður um 5,2 mia. krónur.

## Góð leigu-inntøka

Tað kann loysa seg at eiga ein boripall og at leiga hann út. Í øllum førum hevur felagið Dolphin Drilling Ltd., sum er dóttirfelag hjá Fred. Olsen Energy ASA, tryggjað sær umleið 500 mió. krónur í leiguinntøkum við at leiga boripallin Borgsten Dolphin út í níggju mánaðir. Pallurin skal arbeiða í bretska partinum av Norðsjónum, og ætlandi skal hann hagar, tá hann verður leysur av verandi leigusáttmála eina ferð í august í ár.


Tað kostar 500 mió. krónur at leiga hendan í níggju mánaðir (Mynd: Dolphin Drilling)